gult28 cyan28 magenta28 svart28



## Hotel Føroyar

Hotel Føroyar søkir eftir fólki til summarið at byrja tann 1. mai:

- Tænarar
- Reingerðarfólk
- Hjálparfólki til køkin
- Hjálparfólk til húsavørðin

Umsóknir við møguligum prógvum verða at senda innan 17. apríl til:

**Hotel Føroyar**
Postboks 3303
FO-110 Tórshavn

**Tlf. 317500**

## Frá Havnar Róðrarfelag

Aðalfundurin verður í neystinum flaggdagin 25. apríl 2001 kl. 17.00 við hesi fundarskrá:

1. Val av fundarstjóra.
2. Frásøgn formansins frá farna árinum.
3. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
4. Val av nevndarlimum.
5. Val av tiltakslimum.
6. Val av grannskoðara.
7. Møgulig uppskot frá limum.
8. Ymiskt.

**SK Felagið fyri Skrivstovu-kramba- og teknisk starvsfólk**

**Upplýsir um:**
**-sáttmálan**
**-starvsmannalógina**
**-frítíðarlógina o.a.**

**Gerist limir - so standa vit sterkari!**

**Tlf 316837 og 216837**
**Traðarvegur 20**
**Boks 1378**
**110 Tórshavn**
**skfelag@post.olivant.fo**

**Opið er soleiðis:**
**Mánadag - fríggjadag**
**9.00 - 12.00**
**13.00 - 16.00**

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

Sí SVF tekstvarp s. 650

## Tvingsilssøla

Hósdagin 3. mai 2001, kl. 9.00 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 181, Víkarbyrgi /Sumba (AS nr. 9/2001).

Talan er um eitt jarðarstykki í Víkarbyrgi, ið sambært tingbókini er stórt 336 $m^2$.

Tvingsilssølan er umbiðin av Jógvan E. Ellefsen, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4374901), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski at er síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 5. apríl 2001*

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Reingerðarfólk

Til tær ymisku deildir okkara verður søknast eftir fólki til at avloysa reingerðarfólkið, sum vegna summarfrí ella aðra orsøk ikki eru tøk.

Áhuga verða biðin um at senda skrivliga umsókn inn til Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 22. apríl 2001. Viðmerk á umsóknina "Reingerðaravloysari"

**Tórshavnar kommuna**

SNARSKIVAN

**KATRIN FØROYAR**

**Starv hjá**

## *JB Trade*

### SØLA og VØRUÚTKOYRING

***Okkum manglar fólk at byrja beinanvegin/skjótast tilber.***

***Starvið*** er sera spennandi fyri fólk, ið eru áhuga í sølu og at veita viðskiftafólki eina fyrstafloks tænastu. Fyri rætta fólkið kann væntast góð løn uttan loft.
Starvið verður sett skjótast tilber.

***Starvsøkið*** er einamest fiskivinnan, bæði á sjógvi og landi, og umfatar maskin og viðlíkahaldssíðuna, so fólk við tekniskum førleika kunnu hava fyrimun.

***Vit vænta***, at tú hevur vanligt koyrikort, ert røkin, álítandi, ágrýtin, kanst arbeiða sjálvstøðugt, málrættað og hevur góðan samstarvsvilja.

Hevur hetta tín áhuga, ella vilt tú hava meira at vita um starvið, so ger skjótt av og ring til okkum.

***JB Trade*** spf
Akranesgøta 3
100 Tórshavn

**Tlf. 316887 ella 216887**

**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

STH

## At læra og arbeiða munadygt

Undrast tú, hví tú ikki ert munadyggari í yrki og virki tínum? Vilt tú vera meira virkin og røkka fleiri úrslit í tínum dagliga lívi?
Vilt tú vita nakað um innlæring. førleika og intelligens og kenna tín innlærings- og intelligens-profil? Vilt tú vita nakað um heilan, minnið og minnisfremjan, "Brainstorming", "Mind Map", lesiteknikk og skjótlesing? Vilt tú læra at brúka tína mentalu orku betur, vera meira kreativ/-ur og kunna skipa arbeiðið betur?

| | |
|---|---|
| **Dagar:** | 24; 26; apríl og 1; 3 mai. kl. 16.00 - 20.00 |
| **Skeiðleiðari:** | **Bergur Godtfred** |
| **Kostnaður:** | Kr. 2.600,00 íroknað frálæru, tilfar og mat. |
| **Tilmelding:** | Innan 18. apríl 2001 |

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn, Tel: 318813, Fax: 313374,
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo, Heimasíða: http://sth.olivant.fo

Hervið verður søkt eftir

## Næmingi m/k

at byrja skjótast gjørligt.

Sum næmingur verður tú upplærdur í einum fjølbroyttum handilsumhvørvi.
Høvuðsdenturin er søla av vørum og samskifti við kundar.

Vit vænta at tú hevur góð samstarvsevnir, ágrýtin, nærlagdur/løgd og arbeiðssamur/som.

At tú hevur FHS, HH ella tilsvarandi útbúgving.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sigmar Davidsen.
(eftir arbeiðstíð tlf. 44 83 94).

Umsóknin saman við viðmælum skal vera okkum í hendi í seiansta lagi 20. apríl 2001.

**pf Klement Petersen**
Heiðavegur · Postboks 99 · FO-600 Saltangará
Tlf. 44 75 60 · Fax 44 8460 · E-mail: klp@post.olivant.fo

Sum starvsfólk hjá Pf. Klement Petersen, gerst tú ein partur av einum starvsfólkaskara uppá 7 starvsfólk, sum samstarva í einum góðum og hugnaligum arbeiðsanda. Til tíðir er rættuliga nógv at gera, so tí kanst tú rokna við, onkuntíð at arbeiða longri enn vanligan arbeiðsdag.

**Sosialurin**
www.sosialurin.fo

gult29 cyan29 magenta29 svart29



**TK Stovan**

**Ring!**
**Vit koma**

**TK Stovan er óheft og veitir ókeypis ráðgeving til føroysku vinnuna.**

Vit koma fegin á vitjan, og hjálpa við at kanna tín tørv og tínar menningarmøguleikar. Tú fært greiða kunning um lógir, kunngerðir, fíggjarmøguleikar v.m.

**31 73 66**
**www.tk.fo**

**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
**Fax** 319363
**www**.tk.fot
**E-mail** tk@tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR



# Stóra bringu

## -ella lítla?

**Ert tú ein av teimum 80%, ið ganga í skeivari BH-stødd?**

**Støkk so inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa tær at finna júst tína stødd.**

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm í ummáli, og frá AA til H skál.**

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

siri liv & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610

Sosialurin - 311820

## Fiskamarknaður Føroya

*Fiskamarknaður Føroya umsitur uml. 50.000 tons av fiski um árið og hevði í fjør ein umsetning uppá yvir 1 mia. kr. Felagið hevur umfram høvuðsdeildina á Toftum, eisini deildir í Klaksvík, Sørvági og Vági. Hjá FMF starvast í dag uml. 80 fólk.*

**Nýtt starv sum:**

# Góðskuleiðari

hjá Fiskamarknaði Føroya er leyst at søkja. Starvið fevnir m.a. um fylgjandi funktiónir:

- Umsiting og menning av góðskupolitikkinum og góðskukervinum hjá FMF eftir ISO-9001 skipanini
- Eftirlit við at góðskukervið til eina og hvørja tíð virkar í tráð við ásett góðskukrøv.
- Menning og skráseting av skjalatilfari í góðskukervinum.
- Eftirlit og skráseting av góðsku av fiskinum
- Samskifti við kundar viðv. góðskuspurningum
- Ábyrgd av at virka fyri at FMF røkkur ásett góðskumál
- Fylgja góðskumannagongdum ásettar av leiðsluni

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar við útbúgving innan matvørufrøði, fiskifrøði ella líknandi, hava fyrimun til hetta starvið, men umsøkjarar við øðrum førleikum eru eisini vælkomnir til at søkja.

**Virkisøkir:**
Høvuðsskrivstovan hjá FMF liggur á Toftum, og kemur góðskuleiðarin, at hava sítt høvuðsvirksemi út frá hesari deild. Arbeiðsøkið fevnir tó eisini um FMF í Klaksvík, og góðskuøki á øllum deildum hjá FMF annars.

**Umsóknarfreist:**
Umsókn við viðkomandi prógvum, skal sendast til Fiskamarknað Føroya - 650 Toftir og skal verða FMF í hendi seinasta lagi mándagin **23. apríl. 2001.**

*Nærri upplýsingar um starvið fáast við at vende sær til Fiskamarknað Føroya, tlf. 44 99 99 og tosa við John Nielsen. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.*

## Tvingsilssøla

**Hósdagin 3. mai 2001, kl. 9.30** verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 164 b, Sumba.**

Ognin er eini sethús í tveimum hæddum á 116 $m^2$, gjørd úr bindingsverki, klædd við timbri og takt við eternit. Av kjallarahæddini eru 70 $m^2$ innrættaðir. Í stovuhæddini er durur, gangur, stova, køkur, 3 kømur, baðirúm, wc og trappurúm.

Støddin á grundøkinum er 1008 $m^2$ samb. tingblaðnum.

Sølan er umbiðin av **Ólavur Jákup Kristoffersen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j. nr. 20010143)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

*6. apríl 2001*

**Sosialurin** Lesið Sosialin -tað loysir seg!

## Starvsfólk til Føroya Tele

**Starvsfólk til Bókhaldið**

Til okkara bókhald verður søkt eftir einum fólki at byrja 1. juni 2001 ella skjótast gjørligt.

Á bókhaldinum eru 8 starvsfólk. Høvuðsuppgávurnar á deildini eru umsiting av kreditorum, lønum, kassum og fíggjarbókhaldinum. Øll bókføringin er á Oracle Financials.

Tann, sum sett/-ur verður, má rokna við at luttaka í øllum uppgávum á deildini.

**Førleikar hjá umsøkjaranum**
Tú skal hava skrivstovu- ella líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á, at tú kann taka ábyrgd og arbeiða sjálvstøðugt.

**Tað er eisini ein fyrimunur at hava**
- førleika í EDV
- HH, viðkomandi merkonom- ella líknandi skeið
- góðan røkjuskap
- góð samstarvsevni

Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum góðum, avbjóðandi og mennandi umhvørvi.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Tele og Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar viðvíkjandi starvinum kunnu fáast við at ringja til Martin á Mýruni, deildarleiðara ella Heina Joensen, fíggjarstjóra á tel. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum viðmælum og CV skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. apríl 2001. Umsóknir skulu sendast til

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*

SANSIR · TEL 355 355